# »Dansen i Geneve«



## Ummæli av bókini »Dansen i Geneve« eftir Hans Jacob Helms

UMMÆLI
*Bogi Eliasen*




Rithøvundurin Hans Jacob Helms hevur donsk foreldur, men er føddur í Eysturgrønlandi og hevur búð ein stóran part av lívi sínum í Grønlandi. Flestu av sínum árum hevur hann arbeitt fyri grønlendska Landsstýri og í hesum sambandi serliga innanfyri tann altjóða partin. Bókin tekur nøkur av teim evnunum fram, sum bæði føroyingar og grønlendingar stríðast fyri í altjóða høpi. Hann megnar, á ein serstakliga spennandi hátt, at uppseta politiskar spurningar inn í eina frásøgu av hvussu altjóða skipanin virkar, og ikki minst av persónunum í hesum umhvørvi. Bókin megnar soleiðis eisini at vísa, at tað eru persónar sum eru aktørar í altjóða viðurskiftum, og at avgerðir teirra kunnu verða tengdar at tilvildarligum sambondum millum tilvildarligar persónar, sum vevjist saman av politiskum og persónligum stuttskygdum og langskygdum áhugamálum og ikki minst fjaldum dagsskráum og taktiskum snildi, sum frásøgumaðurin sær og upplivur tað.

Frásøgumaðurin er rithøvundurin sjálvur.

Bókin gerst ógvuliga erlig og stuttlig at lesa, tí at rithøvundurin ikki er bangin fyri at lýsa egin misøk, vísa á hvussu trilvandi hann ofta hevur verið og ikki minst hvussu onnur hava bjarga honum í tí fløkta altjóða diplomatiska spælinum. Men eisini lívið uttanfyri fundarhølini í altjóða arbeiði og tað einsemi tað hevur við sær.

### Stuttsøgur

Bókin er sett saman av seks stuttsøgum, lýstar ígjøgnum rithøvundan sum frásøgumann. Ávísir persónar ganga aftur og seinasta søgan bindir hinar saman. Allar søgurnar leypa í tíð, ið ger tað møguligt at fylgja menningini ella broytingunum í teim altjóða politisku málunum, sum verða tikin fram. Júst hetta ger tað gjørligt, at skilja tað politiska spælið og gevur lesaranum innlit í heimin av altjóða felagsskapum. Lopið í tíð ger, at úrslitini av hørðum stríði síggjast aftur.

Fyrsta stuttsøgan, Dansen i Geneve, er um IWC, um spælið, sum gongur fyri seg innan altjóða diplomati. Hvussu lond brúka IWC til heilt onnur endamál, sum frásøgupersónurin ikki skilur fyrr enn ein íslenskur diplomatur bjargar honum og í veruleikanum brúkar høvuspersónin til egnan fyrimuns, men fyri eini góðari søk.

Onnur søgan, Fuglen over Limpopo, lýsir meistarliga spælið við CITES, sum í hesum føri hevur stóran innanríkispolitiskan áhuga í Týsklandi, soleiðis at teir Grønu ikki skulu fara avstað við ov nógvum atkvøðum. Fundirnir ganga fyri seg í Botswana, sum samstundis verður lýst. Rithøvundurin tekur her trupulleikan við upprunafólki upp. Danir vilja hava ein grønlending avstað, og vita ikki hvat teir skulu gera tá grønlendingarnir senda hvíta frásøgumannin. Upprunafólkini í Afrika vita ikki hvat tey skula gera við henda hvíta inuittin, sum sjálvt stoktur undir sólini í Afrika ella Suðuramerika altíð verður hvítari enn hvítasti kavin í Grønlandi. Serliga vísir henda søgan, at tað ber til náa mál við at arbeiða hart fyri teim, skapa sær alliansur og og ikki at verða bangin fyri størru londum.

The Danish Nation er ein sera stuttlig søga, har indianar í Alaska hava boðið forsetan fyri inuit felagsskapinum, sum er grønlendingur, komi á vitjan, tí teir ynskja limaskap í donsku tjóðini. Forsetin og varaforsetin, sum halda seg verða nakað, taka hetta pent og gera gjøldur burturúr hesum tápulingum. Men í veruleikanum er tað indianararnir, sum bert brúka teir sum statistar í einum taktiskum spæli fyri at vinna sær sjávlum rættindi. Søgan kemur serstakliga væl inn á konfliktina millum hvít og inuit/indianar. Men ikki minst inná misbrúki av bæði alkoholi og rúsevnum hjá inuittum og indiánum og sjálvan høvuðspersónin, sum helst hevði vilja verið uppruna grønlendingur, men sum ikki kann fjala seg í sínum hvíta hami. Hóast samkensla hansara liggur hjá upprunafólkum, forðar hamurin fyri, at hann kann roknast sum ein teirra.

Søgan »Den dobbelte bank« skilur seg burtúr við at verða meira um persónar og persónlig viðurskifti. Søgan hevur fleiri rættiliga erotiskar ella seksullar partar, men endamálið við henni er at lýsa tað dupulta, bæði samfelagssliga og persónliga og kann tann vegin sigast at verða tann persónliga myndin av hvussu altjóða samfelagi virkar. Henda søgan fellur náttúrliga inn í stuttsøgusavnið, við at verða um tað dupulta, hóast tað her er persónar og ikki tað diplomatiska spælið, sum er stýrandi.

Stjernene i Rio lýsir tvey tíðarskeið í Rio, einaferð í 1984 og so aftur til umhvørvisheimsfundin í 1992. Hipokratiska spælið viðvíkjandi umhvørvi, verður væl lýst, eins og fátækradømi verður allýst gjøgnum einhandaða skópussaradrongin Fidel. Søgan tekur meistarliga kontrastin ímillum 1. og 3. heimin fram og hvussu lítið skal til fyri at hjálpa. Skakandi lýsingin av, hvussu brasilianar ruddaðu Rio fyri fátækradømi fram til fundin í 1992, er eftir mínum tykki hæddarpunktið í bókini, sum fær hjarta at banka og, í hvussu so er hjá mær, barkakílan at vaksa.

Seinasta søgan, the Sami Air Force, byrjar og endar á grundlógarráðstevnuni í Føroyum í 2003. Umvegis fyrilestrar í Føroyum og eitt hugnakvøld í Kirkjubø, fer søgan um Svøríki, Noreg og Sveis, og tekur samanum alla bókina. Mest týðandi persónarnir fyri frásøgumannin ganga aftur og arbeiði fyri at tryggja rættin hjá upprunafólki, her serliga samun og grønlendingum.

### Meting

Samanumtikið kann sigast, at bókin er ein framúr lýsing av arbeiði og arbeiðsumhvørvi innan altjóða samstarv, sum harumframt megnar at taka persónligu lagnurnar við. Bókin vísur, at tað lønar seg at stríðast fyri síni søk, hóast størsti parturin av altjóða samstarvi tykist at verða stýrdur av valdspolitikki og tilvildarligum alliansum.

Eg eri ikki tann rætti at meta um bókmentarliga virðið, men bókin er løtt og skjótt lisin, og tekur altjóða politisk evni upp og greiðir frá hvussu altjóða skipanin virkar, sum ein heilt náttúrligan part í stuttsøgunum. Altjóða skipanin er umhvørvið í bókini. Hetta ger, at lærdómur er í henni, eins væl at hon er rættiliga undirhaldandi. Bókin er eftir mínin tykki eitt verk, sum skal lesast hjá einhvørjum við áhuga fyri føgrum bókmentum við støði í veruleikanum, fyri øllum sum hava áhuga í politikki og serliga altjóða politikki. Kanska serliga hjá ungdómi á miðnámsútbúgvingum er hetta ein bók, sum kann seta alheimsgerðina á skemaðið, ella hjá teim, sum ikki hava hug at lesa tjúkkar turrar bøkur um altjóða samstarv, gevur henda bókin eitt gott innlit og eina fatan av tí. Tó skal sigast, at bókin er so inngrógvin í embætis- og politiska heimin, at fólk sum ikki tola hetta, eins væl kunnu halda seg burtur frá bókini.

Ein bók sum heilt avgjørt gevur lesaranum nakað.

*Helms, Hans Jacob, Dansen i Geneve, Fortællinger fra verden 2004, Forlaget Ries, Charlottenlund, Danmark.*